VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Pedagogur

Søkt verður eftir einum pedagogi 35 tímar um vikuna, at byrja 1. mars 2006 ella eftir nærri avtalu.

Á stovuni eru 17 børn í aldrinum 3-5 ár. Stovnurin er ein sjálvsognarstovnur. Børnini eru í aldrinum 3-7 ár.

**Í okkara arbeiði leggja vit dent á:**
- Trivnaðin
- Menning
- Opinleika
- Samarbeiði

**Vit ynskja at umsøkjarin:**
- Hevur góð samstarvsevni.
- Er røkin, nærlagdur og álítandi.
- Nýhugsandi og ígongdsetandi.
- At tú heldur tað verða spennandi og mennandi.

Løn sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið Føroya.

Meiri fæst at vita við at ringja til okkum og tosa við leiðaran Elsebet Bolstad ella varaleiðaran Eyðvør Jensen tlf. 317878

Umsókn við avriti av prógvið og møguligum viðmæli skal verða okkum í hendi seinast 10. februar 2006.

**Barnagarðurin á Konmansmýru**

# Bilsmiður

Fyri ein av kundum okkara, ein bilverkstaður í Eysturoy, verður søkt eftir einum bilsmiði.

**Virkislýsing:**
Tað snýr seg um ein bilverkstað har uml. 4-5 bilsmiðir arbeiða. Amboðini eru nýmótans og arbeiðini eru fjølbroytt, so sum mekaniskt arbeiði, upprætting, lakering, søla og áseting av dekkum v.m.

**Starvslýsing og førleikakrøv:**
Starvið umfatar alt verkstaðsarbeiði. Tað er neyðugt at kunna arbeiða sjálvstøðugt, og førleiki innan sproytulakering er ein treyt.

**Setanartreytir:**
Starvið er heiltíðarstarv, løn og setanarviðurskifti sambært avtalu.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Páll Højgaard, tlf. 441666.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og starvsroyndum verður at senda innan 1. februar 2006 til:

**Sp/F Grannskoðarastovan á Skála**
Dalabøur
FO-480 Skála

## Eysturoyar Apotek

**Nú hevur tú møguleika at vera við á einum skeiði fyri bólkar, har tú leggur av at roykja.**

Roykisteðg-skeiðið verður fyriskipað av roykiavvenjara á Eysturoyar Apoteki og er skipað soleiðis:

Í hvørjum bólki verða uml. 8-10 luttakarar. Vit møtast 5 týskvøld yvir uml. 6 vikur og hvør kvøldfundur er uml. 2-3 tímar.

Byrjað verður týskvøldið 24. januar og síðani møtast vit hvørt týskvøld næstu vikurnar. Skeiðið endar týskvøldið 7. mars. Miðskeiðis í skeiðnum verður dagurin ásettur, tá ið tú skalt leggja av at roykja!

Kostnaðurin fyri skeiðið er 1000,- kr. og tilmelding fer fram á Eysturoyar Apoteki.

Hevur tú fyrispurningar hesum viðvíkjandi, kanst tú ringja á Eysturoyar Apotek og spyrja eftir Mariu Olsen.

**Eysturoyar Apotek**

# Hús ynskjast til keyps

Hevur tú eini hús í Suðurstreymoy, lítil ella stór, summarhús ella heilárshús - alt hevur áhuga. Um vit koma ásamt um prísin, er ikki neyðugt, at tey verða yvirtikin beinanvegin, tað er tín avgerð. Tú kanst avhenda tey nú, um 1/2 ár ella eitt ár ella so.

Skriva til Sosialurin, Box 76, FO-110 Tórshavn

**Bill. mrk. 1230**

# Til sølu

Sethús á Norðoyri.
Grundøki: 435 m².
Kjallarahædd: óinnrættað.
Stovuhædd: 104,3 m². Stova, køkur, 3 kømur, 1 baðirúm, gangur, durur, wc og trappurúm niður í kjallara.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.
Áhugað kunnu venda sær til

**Húsalánsgrunnin, tlf. 314583**

# Aðalfundur

Aðalfundurin hjá Tvøroyrar Bóltfelag, verður leygardagin tann 4. februar kl. 17.00.

Skrá sambært lógum felagsins.

**Tvøroyrar Bóltfelag**
FO-800 Tvøroyri
Tlf. 371570 · Fax 372570
e-mail: tb@tb.fo



# Hugnalig hús í Kollafirði

Ognin matr. nr. 95 Í Homrum 27 í Kollafirði er til sølu um hóskandi boð fæst.
**Loft**: Gongd og 3 kømur. **Miðhædd**: Køkur, stova, baðirúm, durur/gongd og kamar.
**Kjallari**: Er avskildraður. **Bilhús og hjallur**.
Grundøki er 479 m2. Útsýnið er sera gott.

Áhugað kunnu ringja á tel: 421363 ella 211363

# Vágs kvøldskúli

Treytað av góðkenning og nóg góðari undirtøku, ætla vit at fara undir at geva frálæru í

**»Lógarkravda SRC/ROC-VHF skeiðið«**

Byrjað verður ætlandi uml. 1. februar 2006.

Tilmelding innan 29. januar 2006 á tlf. 591196 (Don).

Luttøkugjald á 200,- kr í Suðuroyar Sparikassa (kvøldskúlin). Kvittan skal havast við fyrsta kvøldið.

Undirvísari verður don Petersen.
Undirvíst verður í Vágs skúla.

# Felags barnaverndartænastan

## fyri Fuglafjarðar- og Leirvíkar kommunu

er at hitta yrkadagar frá kl. 8.00-16.00 á tlf. 210806.

Uttanfyri hesar tíðir ber til at koma í samband við barnaverndarnevndina á tlf. 215006.

**Fuglafjarðar kommuna, barnaverndartænastan**


**HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?**

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA